# Føroyar eru ósjónligar í Danmark



**FÓLKATINGSVAL** Fólkatingsvalið í Føroyum fer neyvan at hava týdning í danska valstríðnum, heldur Hans Engell, politiskur viðmerkjari. Hann sigur, færri enn tvey prosent av dønum kenna Føroyar og føroysk viðurskifti

Eirikur Lindenskov

- Fólkatingsval verður í seinasta lagi í apríl. Høvuðsevnini verða búskapur, vælferðarsamfelag, eftirløn, fólkaskúli og útlendingar.

Tað sigur Hans Engell, politiskur viðmerkjari og fyrrverandi politikari og blaðstjóri á Ekstrablaðnum.

Hann sigur, at veljarakanningarnar broytast alla tíðina, men peika í mestan mun á Helle Thorning-Schmidt sum nýggjan forsætisráðharra.

- Eftir nýggjár er tað kortini Lars Løkke Rasmussen, sum hevur verið mest í offensivinum og politiskt-búskaparliga mest konkretur. Javnaðarflokkurin og SF hava tveir greiðar veikleikar: At tey í avgerandi málum ikki eru samd við tey Radikalu, eins og teirra búskaparliga ætlan er ring at greiða fyri veljarnum. Veikleikarnir hjá stjórnini eru, at hon virkar slitin - ráðharrarnir eru ósjónligir, og har hava verið ov nógvar skandalur, sigur Hans Engell.

**- Tað er løgið, at Føroyar hava so lítlan áhuga í donskum politikki, tá sjálvur forsætisráðharrin hevur føroyska konu og kennir Føroyar betur enn nakar av undanmonnunum**

### Føroysku umboðini ikki avgerandi

Alt bendir á eitt val, har frástøðan millum reyða og bláa blokkin verður so stórur, at tað ikki verða eitt ella tvey mandat, sum avgera valið, heldur Hans Engell.

Soleiðis verða føroysku fólkatingsumboðini ikki avgerandi fyri, hvørja stjórn danir fáa.

- Verða tað Sambandsflokkurin og Tjóðveldi, sum vinna sessirnar, so broytir tað als ikki parlamentarisku støðuna. Vinstra og Sambandsflokkurin hava tætt samstarv, og Høgni Hoydal koyrir sína egnu linju í mun til danskan innanríkispolitikk, vísir Hans Engell á.

Hann sigur, at Føroyar gjøgnum seinastu árini eru vorðnar meira og meira ósjónligar í donskum politikki.

- Tað er løgið, tá Danmark hevur ein forsætisráðharra, sum hevur føroyska konu og harvið er tann stjórnarleiðarin, sum kennur Føroyar betur enn nakar annar av sínum undanmonnum, sigur Hans Engell.

### Ikki dramatikkur longur

Hann vísir á, at hetta hevur nakað at gera við, at tað ikki eru stór aktuell ella dramtisk mál í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, og so hevur tað eisini sína ávirkan, at føroyskur politikkur er ógvuliga ósjónligur í donskum miðlum. Eingin veit rættiliga, hvat hendir í Havn.

- Løgtingsfólkini hava als ikki soma sjónligheit í Danmark, sum tá vit til dømis høvdu ein Atla Dam, Sundstein, Breckamnn, Patursson, Djurhuus, Lindenskov, Ellefsen og Johan Nielsen, sigur Hans Engell, sum heldur, at Edmund Joensen og Høgni Hoydal eisini eru markantir føroyskir porfilar, men teir eru nærmast ósjónligir í donskum kjaki.

- Teir blanda seg ikki og eru ógvuliga lítið at síggja í donskum miðlum. Teir seta ikki dagsskránna og hava einki loypandi kjak um ríkisfelagsskapin, ella tað norðurlendska ella arktiska, sigur hann.

### Norðurlandaráðið eisini uttan áhuga

Hans Engell vísir eisini á, at Norðurlandaráðið er vorðið rættiliga ósjónligt í Danmark – eingin dani veit, um Norðurlandaráðið enn er til, ella hvat tey gera har.

- Danskir miðlar hava als ongan áhuga fyri Norðurlandaráðnum. Eingir journalistar taka lut á fundinum, og so verður samstarvið ósjónligt og óviðkomandi fyri danskar veljarar. Tað eru bara tey mest marginalisera donsku fólkatingsumboðini, sum fara upp í norðurlendska samstarvið. Fólk púra uttan ávirkan. Soleiðis var tað ikki fyri 20 árum síðani, sigur Hans Engell.

Hann sigur eisini, at ikki ein gang tvey prosent av dønum kenna føroyskar politikarar, og sjálvt stór politisk og vinnulig mál í Føroyum – eitt nú húsagangurin hjá Fiskavirking, verður als ikki umrøtt í donskum miðlum.

- Eg møtti einum ráðharra nú ein dagin, sum ikki ein gong visti, hvussu løgmaðurin í Føroyum eitur, sigur Hans Engell.

Hann heldur tí, at hetta vísir, hvussu grundleggjandi trupulleikin er – viðurskiftini millum Føroyar og Danmark eru ikki bara ódramatiskt, heldur hann.

- Tey eru vorðin ósjónlig og óviðkomandi. Tey fara meira og meira í bakgrundina, tí hvørki danskir politikarar, veljarar ella miðlafólk fylgja við í tí, sum hendir í Føroyum, og tí at landsstýrið og Løgtingið einki gera til tess at gera Føroyar meira sjónligar uttan fyri Føroyar.

Hans Engell sigur, at tað undrar hann, at føroyskir politikarar ikki hava størri ambitiónir um at gera landið meira áhugavert og dagskrásetandi.

- Føroyar hava jú nógv at bjóða – men brúka tað bara als ikki úteftir. Tað skilji eg ikki, sigur Hans Engell at enda.

eirikur@sosialurin.fo

**Fakta:**

Hans Engell er journalistur og fyrrverandi politikari.
Verjumálaráðarri frá 1982-87
Løgmálaráðharri frá 1989-93
Formaður fyri Konservativur frá 1993-97
Ábyrgdarblaðstjóri á Ekstra Bladet frá 2000-07
Hevur síðani virkað sum politiskur viðmerkjari og fyrilestrahaldari.
Vitjar javnan í Føroyum og kennir til føroyskan politikk og viðurskifti annars.


TAKS

Vit sóknast eftir fleiri kundarøktarum

KUNDARØKTARI

**Hevur tú tænastulyndi og er hugað/ur at møta viðskiftafólkinum, har tey eru stødd, so ert tú kanska næsti kundarøktarin hjá TAKS**

Høvuðsuppgávan hjá kundarøktarunum er at vegleiða og hjálpa viðskiftafólkum við nógvum ymiskum viðurskiftum. Til hetta arbeiðið krevst ein góð fatan av ábyrgdarøkinum og arbeiðsgongdunum hjá stovninum, og tískil er umráðandi, at tú hevur áhuga í at ogna tær neyðugu vitanina og yvirlitið.

Alt avgerandi er tó, at tú hevur hug og hegni at tosa við øll fólk, bæði um tað er andlit til andlit og umvegis telefon. Tú mást hava tænastulyndi og tolsemi, soleiðis at tú áhaldandi kanst veita eina góða tænastu.

Umframt kundavegleiðing, skilja og skráseta kundarøktararnir allan postin hjá stovninum.

TAKS er ein stovnur í menning, og tí vænta vit, at tú ert til reiðar at menna teg saman við stovninum. At tú ert jalig/ur, virkisfýsin, samstarvar væl, og altíð arbeiðir við trúvirði í huganum – tað virða vit.

Vit ímynda okkum, at tú hevur miðnáms- ella skrivstovuútbúgving og/ella aðra líknandi útbúgving. Royndir innan kundarøkt og tænastu eru ein fyrimunur.

Setanarøkið fevnir um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Kundatænastan húsast á Hálsi í Tórshavn.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Ásu Olsen, leiðara í kundatænastuni á telefon 352600.

Umsókn, CV og avrit av prógvum og viðmælum skal sendast til taks@taks.fo ella TAKS, Postsmoga 2151, FO-165 Argir.

Umsóknin skal stílast til Ásu Olsen, leiðara í kundatænastuni og viðmerkjast: Umsókn, kundarøktari. Freistin at søkja starvið er 26. januar 2011 kl. 15.00

Sosialurin 341800



TAKS er í støðugari menning, og miðvíst verður arbeitt fram ímóti, at TAKS verður ein framkomin stovnur, sum gongur á odda á øllum økjum.

www.taks.fo